# Heyganeshúsini beinast burtur



*Heyganeshúsini, sum tey sóu út fyrst í tjúgundu øld. Tá var eisini torn á bygninginum*

**Í næstum verður farið undir at taka niður søguligu Heyganes-húsini, sum standa við havnaøkið í Vestmanna. Arbeiðið at taka niður húsini, sum eru frá 1896, er boðið út**

FORNMINNI
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ein gomul bygdamynd hvørvur skjótt í Vestmanna. Talan er um gomlu Heyganeshúsini, sum standa við havnaøkið í bygdini.

– Sum er eru húsini í sera vánaligum standi, og standa nærum til at falla. Kommunan hevur ikki fíggjarliga orku at gera húsini aftur í upprunastand, sigur Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, og leggur afturat, at nú er bíðað nóg leingi eftir at onkur annar møguliga skal gera arbeiðið. Tí verða húsini nú tikin niður. Vestmanna Kommuna hevur bjóðað út arbeiðið at taka húsini niður, og møgulig tilboð skulu vera kommununi í hendi 26. august.

Vestmanna kommuna hevur enn ikki tikið støðu til, hvat økið, har húsini standa, skal nýtast til. Kommunan eigur húsini og økið, tey standa á. Gunn Joensen vísir á, at sera trongligt er á havnaøkinum, og tí er ikki víst, at nakað verður bygt aftur, har Heyganeshúsini standa.

### Kommunan misrøkt húsini

Vestmanna Fornminnisfelag harmast avgerðina hjá kommunini um at beina burtur Heyganeshúsini. Bjørn á Heygum, sum er í nevndini í fornminnisfelagnum, sigur, at kommunan eigur húsini, og tí hevur ábyrgdina av at halda tey við líka.

– Men tað hevur kommunan als ikki gjørt, og tí eru húsini, sum hava stórt søguligt virði, farin í misrøkt, sigur Bjørn á Heygum.

Vestmanna Fornminnisfelag hevur í fleiri ár arbeitt við at gera húsini til eitt bygdasavn. Byrjað varð fyrst í nítiárunum, og felagið hevur eitt nú skift tak á húsunum, vísir Bjørn á Heygum á, og leggur afturat, at stórviðurin í húsunum eru í góðum standi. Eftir hansara tykki hevur Vestmanna Kommuna ikki áhuga í at varðveita søguligu virðini í bygdini.

Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, vísir har aftur ímóti á, at kommunan fleiri ferðir hevur útsett avgerðina um at taka húsini niður, tí Fornminnisfelagið var inni í myndini, og møguliga skuldi yvirtaka húsini.

– Men har er ikki nóg nógv komið burturúr, til at vit kunnu bíða longur, sigur Gunn Joensen. Í vár samtykti Vestmanna Kommuna so at húsini skulu beinast burtur, og arbeiðið er nú boðið út.

Gunn Joensen sigur, at kommunan ikki hevur gjørt nakra endaliga meting av, hvat tað hevði kostað at fingið húsini, sum eru frá 1896, aftur í upprunastand. Men hon metir, at tørvur er á pengum innan so nógv onnur øki í kommununi, at eingir pengar eru til Heyganeshúsini.



*Vestmanna kommuna fer nú at beina burtur Heyganeshúsini*



# Nýggja nóta-og trolskipið hjá gøtumonnum

**Upprunaliga ætlaði P/F Krossbrekka at byggja eitt verksmiðjuskip, men av tí, at felagið ikki kundi fáa lyfti um svartkjaftakvotu, fyrr enn svartkjafturin er býttur millum strandalondini, ið veiða svartkjaft, varð ætlanin slept**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Nýggja skipið hjá gøtumonnum er mest líkt Krúnborg. Myndin av snotuliga nóta-og trolskipinum hjá P/F Krossbrekku er av heimasíðuni hjá Skipsteknisk.no*

Herfyri undirskrivaði P/F Krossbrekka í Gøtu, sum er systurfelag hjá P/F Varðanum, ið eigur Trónd í Gøtu, sáttmála um bygging av nýggjum nóta-og trolskipi í Noregi.

Tað verður skipasmiðjan, Langstein í Noregi, sum skal byggja nýggja og snotuliga skipið hjá gøtumonnum. Skipið fær fiskiloyvini hjá Finni Fríða og Saksabergi, sum fara úr flotanum.

Nýggja skipið hjá gøtumonnum, sum á heimasíðuni hjá Skipsteknisk AS í Noregi eitur Finnur Fríði, fer at royna eftir sild, makreli, lodnu, svartkjafti og rossamakreli.

### Við ársenda 2003

Gongst sum ætlað, kemur nýggja nóta-og trolskipið í føroyska fiskiskipaflotan við ársenda 2003.

Skipið verður 76,2 metrar langt og 15 metrar breitt og fer at lasta 2600 tons.

Til samanburðar við onnur skip í flotanum, verður nýggja skipið hjá gøtumonnum mest líkt Krúnborg hjá Eileri Jacobsen.

Mett verður, at skipið fer at kosta út við 150 milj. krónur.

### Verkætlanin tódnað

Upprunaliga ætlaði P/F Krossbrekka at byggja eitt verksmiðjuskip, sum skuldi flakaskera uppisjóvarfisk. Í hesum førinum var talan um eitt nógv størri skip og eina nógv dýrari verkætlan, sum væntandi fór at kosta einar 230-250 milj. krónur.

Sum skilst, vórðu hesar ætlanir sleptar, tí P/F Krossbrekka kundi ikki fáa lyfti um svartkjaftakvotu, fyrr enn svartkjafturin er býttur millum strandalondini, ið veiða svartkjaft.

# Orcades Viking loysir aftur fyrst í september

**Skipið hevur ligið á Skála við brotnum motori síðan í januar, og tvídráttur hevur verið millum eigararnar av skipinum og tryggingarfelagið í Noregi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Líka síðan í januar hevur fyrrverandi Heygadrangur ella Orcades Viking, sum hann eitur, ligið á Skála við brotnum motori. Skipið, sum er heimahoyrandi í Kirkwall, er væl kent í Føroyum og hevur lagt nógv túsund tonsini av uppisjóvarfiski upp til Faroe Cold Stores í Vági, sum er heitið á stóru frystigoymsluni, ið Jóhan Dahl eigur saman við útlendingum.

Samstarvið millum reiðaríið hjá Orcades Viking og Faroe Cold Stores hevur lagt nógvar tímalønir eftir seg í Vági. Og tað er ikki sørt, at vágbingar hava saknað skipið, nú tað hevur ligið svínabundið so leingi.

### Togan um motorin

Í januar hendi tað, at motorurin á skipinum fór so illa, at reiðaríið metti, at skipið mátti fáa nýggjan motor.

Tvídráttur tók seg upp millum reiðaríið og tryggingarfelagið í Noregi, har skipið er tryggjað.

Jóhan Dahl í Vági sigur, at reiðaríið vildi hava nýggjan motor í skipið, meðan norska tryggingarfelagið helt, at málið kundi loysast við einum brúktum motori.

Tí dróg út at fáa tryggingarspurningin avgreiddan.



*Orcades Viking ella gamli Heygadrangur er væl kendur í Vági, har hann hevur lagt nógv túsund tons av fiski upp.*
*Líkt er nú til, at skipið, sum hevur ligið á Skála við brotnum motori síðan í januar, fer aftur til fiskiskap fyrst í september.*

### Liðugur um 1 mðr.

- Eg havi ikki sett meg so nógv inn í hetta málið, men havi skilt, at

tryggingarspurningurin nú er avgreiddur, soleiðis at skipið kann loysa fyrst í september við nýggjum motori.

Jóhan sigur, at nýggi motorurin á Orcades Viking er ein Wartsila, sum er góðar 5000 hk., men er blombaður niður á somu hestakreftir, sum gamla maskinan var.

Spurdur, hví tað er gjørt, heldur Jóhan Dahl, at hetta hevur nakað við fiskiloyvini hjá skipinum at gera.

# Nógvur fiskur komin uppá land í Suðuroy

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú fleiri virkir norðanfjørðs hava verið stongd í 2-3 vikur í summar, er rættiliga nógvur fiskur komin uppá land í Suðuroy, har øll fiskavirkini hava verið opin alt summarið.

Martin Hentze, sum starvast á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at tey har suðuri hava havt úr at gera seinastu vikurnar.

- Her hava nógvar landingar verið í summar, sigur hann.

Hesa vikuna hava fýra trolarar lagt veiðina upp til Fiskavirking á Tvøroyri.

Skansatangi og Research hava verið inni við ávikavist 72.000 og 64.000 pundum, Vesturskin við 187.000 og Safir, sum landaði í gjár, var við umleið 100.000 pundum.

### Misjavnur upsi

Martin sigur, at upsin hjá Skansatanga og Research var smáur, upsin hjá Vesturskin hampiligur, men upsin hjá Safir var góður í mun til støddina á upsanum annars.

Hjá garnabátunum hevur summarið ikki roynst nakað serligt. Fiskiskapurin hevur verið smáligur og nøgdirnar av svartkalva, sum lagdar eru upp á Tvøroyri seinastu vikurnar, hava yvirhøvur verið smáar.

- Frægasta svartkalvalastin í seinastuni, er lastin hjá Anitu, sum í síðstu viku legði 24-25.000 pund upp á Tvøroyri. Annars hava skipini ligið millum 8-10.000 pund hvønn túrin, sigur Martin Hentze, sum ásannar, at nógv minni av svartkalva hevur verið at fingið í summar enn seinasta summar.

Lítil útróður hevur eisini verið seinastu tíðina, og við snelluni hevur lítið borið til. Teir, sum royna við línu, gera tó ein hampiligan túr av og á.